**BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ**

Ministry of Children and Education

## Áhugavert og fjølbroytt starv sum løgfrøðingur leyst at søkja í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til setanar skjótast gjørligt.

**Starvi**

Talan er um eitt fulltíðarstarv í einum spennandi politiskum arbeiðsumhvørvi. Løgfrøðingurin arbeiðir á Fakdeildini við løgfrøðiligum málum innan barnaøkið, harundir barnaverndarøkið. Uppgávurnar í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum eru bæði fjølbroyttar og áhugaverdar. Høvuðsuppgávurnar eru **m.a.** hesar:

- Lóggávumenning – at taka lut í fyrireikingini av lógar- og kunngerðaruppskotum og regluverki
- at tulka lógir, kunngerðir og reglur
- at veita leiðslu og starvsfólkum í ráðnum løgfrøðiliga ráðgeving og vegleiðing
- at viðgera kærur í samráð við aðrar partar í ráðnum
- løgfrøðiliga at góðskutryggja málsøki ráðsins í síni heild
- at svara fyrispurningum frá Løgtinginum
- at umboða ráðið í tvørgangandi samstarvi
- at lýsa og avgreiða mál, ið hoyra stjórnarráðnum til

**Førleikakrøv**

Umsøkjari til starvið skal hava løgfrøðiligt embætisprógv, cand.jur., ella javnbjóðis prógv, vera skipaður og duga væl at orða seg á føroyskum og skandinaviskum, bæði í skrift og talu.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, umframt at arbeiða í toymi og arbeiðsbólkum. Tú skalt vera tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Tú skalt hava førleika at seta teg inn í nýggj viðurskifti og duga at miðla hetta víðari til onnur. Eisini mást tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti. Tú skalt hava góð analytisk evni umframt politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum í síni heild eins og førleikar í fremmandamáli, serliga enskum.

**Vit bjóða**

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanarøkið fevnir um øll stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

### Umsókn

Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
110 Tórshavn
ella við telduposti til: bumr@bumr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **sunnudagin 11. august 2024**. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Elsu Østergaard, deildarstjóra, á tlf. 555004 ella t-post elsao@bumr.fo.